# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

*Sunnudagin 5. september fingu Røskva & Ronja eina systur, so nú eru tær tríggjar. Díddan var 55 cm lang og vigaði 3900 gr. Foreldur eru Eybjørg Hansen & Sámal Ímundarsson.*

*2. september fingu Sóley og Alex Troleis, Toftum, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3650 gr.*

26. august fingu Noomi Kunoy Heradóttir og Dávur Kunoy Høgnason, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 4000 gr og var 57 cm langur. Hann eitur Høgni Kunoy Dávason.

30. august fingu Eyðhild og Suni Poulsen, Vági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3350 gr.

30. august fingu Anna og Sankey Viðstein, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2880 gr.

4. september fekk Elisabeth Joensen, Porkeri, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3150 gr.

5. september fingu Elsa M. Dam og Dánjal Jákup Vilhelm, Norðskála, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4050 gr.

8. september fingu Lis og Sjúrður Sivertsen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3950 gr.

9. september fingu Meiken og Arnfinn Hansen, Norðragøtu, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

9. september fingu Maria og Thomas Thomsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2890 gr.

9. september fingu Winnie Tausen og Søren Poulsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3150 gr.

10. september fingu Una og Mourits Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

10. september fingu Beinta Lamhauge og Vøgg Nyholm Debess, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4200 gr.

11. september fingu Gurið og Brandur Tómasson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3900 gr.

11. september fingu Linda Karbech Rasmussen og Gert í Hjøllum, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3700 gr.

12. september fingu Donabel og Bergur á Kósini, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3100 gr.

13. september fingu Malan Larsen, Tvøroyri, og Kolbjørn Eyvindsson, Hvalba, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3150 gr.

13. september fingu Jórun S. Ludvig, Hoyvík, og Jóan Pauli Wilhelmsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2900 gr.

13. september fingu Maibritt og Hans Hansen, Runavík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4200 gr.

14. september fingu Nelly Debes og Rúni Christiansen, Strondum, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4250 gr.

15. september fingu Amy og Finn Heri Johannesen, Kollafirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3650 gr.

16. september fingu Susan og Høgni Stakksund, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4300 gr.

## Beintu Biskopstø

### til minnis

Lítillátað
Mest sum tú vart ikki til
Birti tú í huganum mildan yl
Hann er eftir
Og tú ert ikki til.

Nei, Beinta er ikki til longur, men sum Christian Matras so væl tekur til, ylurin er eftir.

Vit kendu Beintu frá lesibólkinum, har vit kjakaðust um bókmentir og list í einum frælsum forum og altíð við virðing fyri áskoðanini hjá hvørjum øðrum. At so var, átti Beinta sín stóra leiklut í. Við sínum verimáta ríkaði hon okkum mangan kvøldini. Beinta var lítillátin, men ofta beinrakin, hon var láturmild og sjálvironisk, men altíð við tí góða orðinum mótvegis øðrum. Jørðbundin sum fáur, og kortini djúp, tá ið lívsins stóru spurningar vóru havdir á lofti.

Beinta hevði listarligar gávur og, sum Heri prestur eisini nevndi, ans fyri tí fagurfrøðiliga í øllum rundan um seg. Tað er gott at vita, at hennara evni eru borin víðari til næstu ættarliðini.

Vit eiga eisini nógv góð minnir frá okkara felags ferðum, bæði vikuskiftisferðum á Viðareiði og aðrastaðni í Føroyum, og frá uttanlandsferðunum í Prag og í Skotlandi. Á ferðunum var tað altíð ein uppliving at eygleiða Beintu og síggja, hvussu hon legði til merkis smálutir, sum vit onnur ikki gáaðu um, og tí var hon ofta í okkara huga, nú vit á páskum vóru í Róm. Mangan hava vit tosað um, hvussu nógv Beinta hevði fingið burturúr, hevði hon verið við.

Soleiðis kendu vit Beintu, og soleiðis minnast vit hana við takksemi.

**Beintu'sa lesivinir**

Magnus Egholm, Tórshavn:

## Kendur hýruvognsførari 80 ár

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sunnudagin 19. september fyllir Magnus Egholm í Havn 80 ár.

Hóast høga aldurin er Magnus at síggja hvønn dag í hýruvogn sínum og á bilstøðini Auto. Hann hevur koyrt hýruvogn í Havn síðan miðskeiðis í 40-unum, og kennir hann býin sum sín egna buksulumma.

Magnus er hvalvíkingur. Sum ungur fór hann til skips og sigldi eina tíð, áðrenn hann fór at koyra hýruvogn.

Hann koyrdi á bilstøðini hjá Finni Hansen í Tróndargøtu í 40-unum og seinni á Bilstøðini í J.C. Svabosgøtu.

Magnus var ein av fyrsu partaeigarunum í bilstøðini Taxa í Kongagøtu, sum tann 1. mai 1953 bleiv løgd saman við Bilstøðini. Í 1955 skifti støðin navn til Auto.

Magnus er giftur við Elisabeth, f. Eliasen, ættað av Kirkju í Fugloy. Børnini eru: Hanus og Guðni, sum búgva í Havn, og Anna Maria, sum býr á Argjum.

Føðingardagin er Magnus burturstaddur.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Justa Poulsen áttati

19. september fyllir Justa Poulsen í Fuglafirði 80 ár. Hon varð borin í heim í Sumba 1924. Foreldrini vóru Elsebeth Maria og Hans Petur Kjærbo, vanliga kallaður Ebban og Petur Eystan Á. Justa var nr. 5 av 7 systkjum. Í dag eru trý á lívi, beiggin Erling og systurin Petrea og búgva tey í Sumba.

Justa átti ein beiggja giftan í Fuglafirði. Hon kom norður til hansara at tæna. Har hitti hon mann sín, Símun Paula, hann var einabarn hjá Rakuli og Hans Sigmund Poulsen. Justa og Símun Pauli giftust 6. januar 1951, búðu í heiminum hjá Paula saman við foreldrum hansara, til tey bygdu heim teirra í Rossagerði í 1969 og har tey búgva í dag. Tey eiga trý børn, tvær døtur, sum búgva í Fuglafirði, og ein son, sum býr í Runavík, fimm barnabørn og eitt langommu- og langabbabarn.

Tey, ið vilja gleða Justu á føðingardegnum, eru hjartaliga vælkomin í heimið hjá dóttrini og versoninum Ebbu og Erlingi, har føðingardagurin verður hildin sunnudagin 19. september frá kl. 17.00.

8. februar í ár fylgi Símun Pauli áttati ár. So tykkum báðum verður ynskt hjartaliga tillukku og Guds ríku signing.

## Annfinn Reinert seksti

Mikudagin ið fór, tann 15. september, fylti Annfinn Reinert, sløkkiliðsmaður í Havn, seksti. Annfinn er ættaður úr Norðradali, sonur Astrid og Albert Reinert, Albert í Norðradali.

Annfinn kann av røttum sigast at verða ein ímyndin av sløkkiliðnum í Havn, tí hann hevur tænt hesum liði í samfull 37 ár. Hann byrjaði sum »leysur maður«, teir kalla, í 1967, og í 1975 varð hann settur í fast starv. Kortini byrjaði hann longu fast á Brandstøðini í Havn árið fyri, í 1974 sum avloysari.

Brandstøðin í Havn varð mannað í 1971, tá Símun Poulsen var sløkkiliðsleiðari. Fasta liðið hjá honum taldi tá Hansemann Mikkelsen, Hilmar Johannesen, Bjarka Christiansen og Gudmund Isfeld. Í 1974 fóru Bjarki og Gudmund úr starvi, og tá vórðu Annfinn Reinert, Petur J. Sigurstein og Petur Jacob-sen setir í starv - og vaks fasta liðið tá við einum manni. Saman við leysu sløkkiliðsmonnunum taldi liðið tá eins og í dag tilsamans umleið 30 mans. Sløkkiliðið hevði tá til húsa í gomlu Brandstøðini niðast í Varðagøtu, sum varð bygd í 1965. Fyri tíggju árum síðani flutti Brandstøðin niðan í nýggjan bygning í gamla grótbrotinum uppi á Varða. Virksemið hjá støðini er nógv broytt hesi árini Annfinn hevur verið í starvi. Í dag hevur støðin eitt nú tveir bussar til av-lamisflutning og tveir bilar til bilaflutning. Hesir bilar koyra so at siga allan dagin. Sløkkiliðsmenninir arbeiða aðru hvørja viku. Tá hava teir tvær 24 tíma vaktir umframt vanligan átta tíma arbeiðsdag.

Starvsfelagarnir siga um Annfinn, at hann er ein álitismaður, sum sjáldan sigur nei. Hann er ein av innsatsleiðarunum í Sløkkiliðnum, og hevur í fleiri ár virkað sum næsti maður hjá sløkkiliðsleiðaranum og varaleiðaranum. Tá onkur teirra hevur verið burturstaddur, hevur Annfinn virkað sum leiðari, og ta uppgávuna hevur hann røkt sera væl, siga starvsfelagarnir.

Annfinn er innløgumaður. Honum dámar sera væl at fáast við jørð og seyð, gæs og dunnur - og so hevur hann eisini ross og er týðum við í ríðikappingum. Hann og konan, Sólbjørg Thomasen, búgva í Dalagøtu í Havn. Hon er ættað úr Kvívík og starvaðist í nærum 30 ár á bilstøðini Auto í Havn. Tey eiga sonin Fríðbjart.

## Jóanis Nielsen 50 ár

Fríggjadagin 17. september fylti Jóanis Nielsen í Sandavági hálvt hundrað ár. Hann hevur í mong ár verið ein av teimum, sum hava verið við til at mynda Sandavág og Vágarnar, og hann hevur eisini verið tingmaður. Føðingardagin er hann burturstaddur.

Jóanis er sandavágsmaður. Foreldrini eru Fía og Andrias Nielsen. Tey eiga trý børn - Ninna, Tóra og Jóanis - sum øll búgva í Sandavági. Jóanis er giftur við Andreu, sum eisini er úr Sandavági. Tey eiga fimm børn - Sølja, Fía Selma, Andrias, Jóanis Albert og Tóri.

Í 1972 fór Jóanis í bankalæru í Føroya Banka í Vágum, og har arbeiddi hann inntil 8. apríl í 1994, tá ið hann segði seg úr starvi. Tá var hann deildarleiðari í Vágum. Tríggjar dagar seinni varð bankin samanlagdur við Sjóvinnubankan.

Í 1995 fór Jóanis á lærarakúla, hann leyk prógv í 1999, og nú er hann lærari á Giljanesi.

Jóanis varð valdur í kommunustýrið í Sandavági á valinum í 1980. Hann var formaður í felagskommununi í Vágum fyrsta valskeiðið, og næsta skeiðið var hann formaður í Sandavágs kommunu. Í 2000 varð Jóanis aftur valdur í bygdarráðið. Jóanis kom á ting tá ið Jørgen Niclassen gjørdist landsstýrismaður í 1998, og hann sat sum eykamaður, inntil Jørgen fór úr starvinum. Hann er framvegis tiltaksmaður hjá Fólkaflokkinum í Vágum.

Jóanis hevur verið sera virkin ítróttarmaður. Hann spældi hondbólt og fótbólt við SÍF, og hann var yvir 40, tá ið hann gavst at spæla hondbólt. Í 1971 gjørdist hann formaður í SÍF. Tann sessin røkti hann í 20 ár, inntil hann tók seg aftur í 2001. Meðan hann hevur sitið í bygdarráðnum, hevur Jóanis ikki hildið tað hóskað seg at vera í SÍF leiðsluni.

Í frítíðini er Jóanis nógv úti í náttúruni. Hann hevur trý føroysk ross, og hann hevur góðan hug til seyðahald. Hann er røktingarmaður á Slættanesi, og tað er so ofta, at hann stimar norður hagar fyri at vita, hvussu tað stendur til. Ikki minst í lembingini, og nú, tá ið 50 ára føðingardagurin er farin afturum, og fjallgongan stendur fyri.

Føðingardagin er Jóanis burturstaddur.

## Prógv

25. august 2004 fekk Guðrið Weihe, Tvøroyri, prógv í stjórnmálafrøði við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn við sergreinunum umsiting, leiðsla og altjóða politikkur. Sum lið í útbúgvingini hevur Guðrið verið í starvsvenjing á donsku sendistovuni í Berlin, harumframt hevur hon starvast hjá ráðgevingarfyritøkuni RAMBØLL Management, Dansk EvalueringsSelskab og seinast sum granskingarhjálp hjá professer Ove K. Pedersen við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn.

Karolina Matras, Fuglafirði, tók 7. september prógv sum sálarfrøðingur frá Danmarks Pædagogiske Universitet.

Oddbjørg Balle, Tórshavn, tók 9. september prógv sum sálarfrøðingur frá Danmarks Pædagogiske Universitet.

Rakul Napoleonsdóttir Joensen hevur á Århus Dag- og Aftenseminarium lokið prógv sum lærari.

Rigmor Napoleonsdóttir Arge hevur á Danmarks Pædagogiske Universitet, Keypmannahavn, lokið prógv sum sálarfrøðingur (cand. pæd. psyk.).

Bjarni í Sjúrðargarði hevur á Danmarks Pædagogiske Universitet, Keypmannahavn, lokið prógv sum sálarfrøðingur (cand. pæd. psyk.).

## Brúdleyp

Í dag, 18. september, kl. 15.00 giftast í Glyvra kirkju Elsebeth Ragnhardsdóttir Hansen, Saltangará, og Jørgin Jacobsen, Leirvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Fríggjadagin 17. september *giftust* Alex og Ellen Buvik í Stavanger Tinghus.

## 85 ár

Í morgin 19. september verður Peter Larsen, vanliga nevndur Pidda, Porkeri, 85 ár.
Hann er burturstaddur.

## 80 ár

Sunnudagin 19. september verður Justa Poulsen í Fuglafirði 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini og versoninum Ebbu og Erlingi frá kl. 17.00.

## Dagurin

**18. september. Titus.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni, men her verður helst ikki, sum summir halda, sipað til tann Titus, sum Paulus skrivaði bræv til.

**19. september. Constantia.** Kom upp í álmanakkan frá árinum 1700, men vit vita ikki, hvønn sipað verður til.

**20. september. Tobias.** Til minnis um tann Tobias, sum apokrýfiska bókin Tobits bók veit at siga frá. Navnið er hebráiskt og merkir *Guð er góður.*